# Maersk Air í prískapping

*Maersk Air bjóðar føroyingum tvinni tilboð við bíligum ferðum til Danmarkar fram til jóla*



*Maersk Air vil hava fleiri føroyingar at nýta flogfarið hjá felagnum á rutuni millum Føroyar og Danmark*
*Mynd: Edvard Joensen*

EDVARD JOENSEN

1.500,- krónur, um tvey ferðast í felag. Ella jólaferð fyri 1.250,- krónur, eru tilboðini, Maersk Air bjóðar teimum, sum ferðast úr Føroyum til Danmarkar fram til jóla.

Prískappingin millum flogfeløgini á Føroyarutuni heldur fram. Nú bjóðar Maersk Air føroyingum tvinni sløg av bíligum ferðum.

Maersk Air sigur í tíðindaskrivi mikudagin, at felagið gevur kundum sínum 1.000 góðar grundir til at flúgva við teirra flogfari. Nevniliga ein avsláttur upp á kr. 1.000,- av APEX ferðaseðlaprísinum.

Tilboðið ber í sær, at í tíðarskeiðnum frá 23. oktober til 3. december, báðir dagar íroknaðir, ber til at ferðast millum Vágar og Kastrup og Vágar og Billund (ella hinvegin) t/r fyri kr. 1.500,-. Avsláttur upp á 50% verður latin børnum millum tvey og ellivu ár. Børn undir tvey ár fáa 90% avsláttur.

Treytir fylgja tó við tilboðnum. Ferðaseðlarnir skulu vera keyptir í seinasta lagi sjey dagar, áðrenn farið verður. Tað er ikki gjørligt at broyta ferðaseðilin, og heldur ikki verður peningurin afturgoldin, um ferðin verður avlýst. Sunnudagsreglan er galdandi. Tað vil siga, at tann ferðandi skal vera burtur minst eina sunnunátt. Ferðin skal í mesta lagi vara ein mánað, og minst tvey fólk skulu ferðast saman. Forsølan av ferðaseðlum til hetta tilboðið er frá 16. oktober til 3 december.

Hitt tilboðið, Maersk Air bjóðar føroyingum, er eitt jólatilboð. Maersk Air bjóðar kundum sínum at halda jól í Danmark bíliga. Soleiðis at skilja, at tað skal vera bíligt at ferðast ímillum Føroyar og Danmark.

Tilboðið er galdandi frá 8. december í ár til 7. januar næsta ár, báðir dagar íroknaðir. Prísurin fyri ferðaseðilin hesa tíðina er kr. 1.250,-. Eisini her er avsláttur upp á 90% til børn undir tvey ár, og 50% til børn millum tvey og ellivu ár.

Eisini her fylgja treytir við. Eins og við fyrra tilboðnum skal ferðaseðilin vera keyptur sjey dagar, áðrenn fráferð. Tað ber ikki til at broyta ferðatíðirnar, eins og peningurin ikki verður afturgoldin, um ferðin verður avlýst. Tann ferðandi skal vera burtur minst sjey dagar, men ikki longri enn 21 dagar.

Maersk Air sigur í tíðindaskrivinum, at felagið fyrr í ár hevur havt tvey líknandi tilboð, sum góvu góð úrslit, bæði fyri ferðafólkini og flogfelagið. Tí verður við góðum treysi roynt aftur, sigur Maersk Air.





## Innanduravenjingar byrja aftur!

Mánadagin 16. oktober byrja innanduravenjingarnar hjá B36 aftur í Ítróttarhøllini.

Venjingarnar vera soleiðis:

**Mánadagar**
15.00-16.30 Smápiltar
16.30-18.00 Pinkulingar
18.00-19.00 Gentur 10-12 & Gentur 12-14

**Mikudagar**
15.00-16.30 Piltar

**Fríggjadagar**
17.00-18.00 Pinkur
18.00-19.00 Smádreingir

Kom og ver við frá byrjan. Klipp hesa lýsingina út ella minn teg á venjingartíðirnar á www.b36.fo.

**Vælkomin!**



## Keyp myndir



Nú er møguleiki at keypa myndir sum standa í Sosialinum

Kostnaður pr. stk. fyri litmynd:
10x15 cm. kr. 80,- 18x24 cm. kr. 150,-
13x18 cm. kr. 100,- 20x30 cm. kr. 200,-
15x21 cm. kr. 130,- 30x45 cm. kr. 350,-

Fyll henda lepan út.
Klipp myndina út og send hana saman við lepanum til Sosialin.

Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Blað nr.: ____
Síða: ____
Stødd: ____
Mongd: ____

Navn: ____
Bústaður: ____
Telefon: ____




## Viðmerkingar

# Gloymda Perlan



Spælihúsið Perlan hevði stóran týdning fyri tónleikalívið í Havnini tað tí tað var. Tá hon varð niðurtikin lovaðu býráðslimir, eisini okkurt valevni til hetta býráðsval, at nýtt hús skuldi verða bygt alt fyri eitt.

Bla bla.

Tað er sannroynd at okkara alternativa tónleikalív í Havnini hevur ikki góðar umstøður at virka undir.

Eitt tónleikahús sum eigur at rúma øllum slagi av tónleiki eigur at verða útvegað ella bygt innanfyri eitt ár.

Tú stuðlar ikki mentanini við føgrum orðum og valfleski, men við vælviljandi skjótari fígging.

Býráðnum tørvar kreativar, tónleikaáhugaðar limir.

Komi eg í býráðið skal eg gera nakað við hetta mál.

**Johan Mortensen**
**Valevni til Býráðsvalið fyri Tjóðveldisflokkin**

# Lítil viðmerking



Undirritaða er ikki valevni til býráðsvalið í november mánaða, so hetta er ikki ein valgrein, men meira ein viðmerking og spurningur til býráðslim og valevni Tjóðveldisfloksins, Klæmint Olsen.

Í valgrein nevnd "**Beata og Snarskivan",** sum stílað er til eitt av valevnum Sambandsfloksins**,** leggur Klæmint Olsen undirritaðu undir ikki at vilja hava samstarv við Tjóðveldisflokkin, og at hava sagt nei takk, tí flokkurin ikki var nóg góður. Hann sammetir enntá Tjóðveldisflokkin við "fríggjara"!

Hvar hevur Klæmint Olsen hoyrt hasa søguna? Sjálv kenni eg onki til hana, tí Tjóðveldisflokkurin og Sambandsflokurin fingu ongantíð høvi at tosa saman.

Annað umboðið hjá Javnaðarflokkinum kom á fund við Sambandsflokkin dagin eftir valið, so sum avtalað var millum hana og Sambandsumboð longu uppi í Ítróttarhøllini valkvøldið, meðan undirritaða sat bundin av tímalangari sjónvarps- og útvarpssending í somu høll. Hetta kunnu tey, sum luttóku á fundinum á býráðsformansskrivstovuni dagin eftir vátta.

Ongin okkara segði, at Tjóðveldisflokkurin ikki skuldi við í eina møguliga samgongu, men vit høvdu okkara tankar, tí sum vit longu tá hildu okkum vita, so kom Javnaðarumboðið beint av fundi hjá tí samgongu, sum gjørdist veruleiki somu nátt!

Sum nevnt, so náddu vit ikki at tosa við Tjóðveldisflokkin, og samráðingar vóru ongar, sum annars hevði verið ein meira virðilig loysn, **eisini tá eitt samstarv verður sagt upp.**

Tí haldi eg, at Klæmint Olsen skuldi greitt frá, hvaðani hann hevur umrøddu søgu.

**Lisbeth L. Petersen**

# Nuværende og kommende bådejer!!!



Der er mange, som naturligt er, der har båd og har fået en plads til denne i Torshavn Kommune. Da bådpladserne i Tórshavn/Argir er begrænset, eller rettere sagt optaget, er ansøgningerne om bådplads steget. I følge administrationen flere hundrede. Ventelisten er nu blevet så lang, at det ikke er muligt at oplyse ansøgerne om, hvilket nummer de har på listen.

Forholdene på land hvorunder bådejerne på Argir må efterse og vedligeholde deres både er ikke gode. Det er ikke særligt hyggeligt at male båden under de forhold, som er nu – vådt/muddert, olierester og stenet.

En planering af arealet med en belægning – det være sig betong eller asfalt – er vel et rimeligt krav. Økonomisk burde det være muligt.

Som valgemne til byrådet i Tórshavnar kommune vil undertegnede medvirke, hvis jeg får mulighed for dette – til en forbedring av overnævnte forhold vedrørende bådpladser på land og i vand.

**Henning Christensen,**
**valevni til býráðsvalið í Tórshavn**

## Lesarabrøv

# Samkensla, signing ella hjálp til frælsi?



Í 1987 var eg saman við vinum á møtirøð í Frankfurt, nevnd Fire Conferens. Tað var kendi týski evangelisturin Reinhard Bonnke, ið skipaði fyri, og ein av talarunum var heimskendi amerikanski jødin Benny Hinn. Benny Hinn prædikar um Jesus, so menniskju koma at leska Hann, verða sett í frælsi, verða grødd, og undur og tekin henda, sum sjálvdan.

Ein av teimum, ið fór fram at verða biðin fyri, var fransmaður í bestu árum, men deyðamerktur av AIDS. Hann kendi ikki Jesus, men var boðin við av vinum, ið høvdu trúgv fyri at Frelsarin fór at frelsa, grøða og seta í hann í frælsi frá tí »samkyndu« lívsførslu, hann hevði latið seg lokka til.

Grípandi var at vera vitni til undrið, sum hendi, tá Himmalin opnaðist.

**Eitt fullkomið frælsi!**
Sonurin, Jesus, bjóðar frælsi – frælsi frá øllum tí, ið bindir, eisini einari lívsførslu, sum førir við sær sorg, sjúku og deyða. Ætlan Hansara er, at tú og eg, hóast feilandi og máttleys í okkum sjálvum, sum sendiboð í Hansara stað skulu bera hetta frælsið til onnur. Hann hevur aldrin ætlað og ongantíð sett hin trúgvandi at boða eitt kompromis, bert at vísa samkenslu, at lta sær lynda, at tosa eftir munninum, góðtaka ella, sum mangan verður gjørt, at lýsa sokallaða signing yvir eitt lív í ófrælsi, eitt lív í synd.

Ynski Frelsarans er tað sama í dag!

**Til tín, sum heldur teg vera »samkyndan«**
Jesus elskar teg, og ynskir tær sama frælsi sum øllum, ið koma til Hann við byrðum sínum, ivast ongantíð tí. Góðtak ikki hjálp g sokalða asigning, ið vegna vantrúgv verður boðn tær, og sum framyvir hart fer at halda teg bundan í trælahaldi deyðans. Jesus hevur størri ætlanir við tær og lívi tínum – ætlanir um framtíð og vón.

**Jenis av Rana**

# Privat e-mail!

I morges (lørdag den 7. oktober) åbnede jeg min e-mail post og fandt en e-mail fra Elin Lindenskov. Jeg tænkte, det var da dejligt, hvad skriver hun til mig? Da jeg åbnede hendes brev, så jeg, at det var slet ikke et personligt brev, men en valgreklame i forbindelse med kommunevalget. Hun skriver i dette valgmateriale, at hun har fundet min e-mail adresse på Olivant, og hvis jeg ikke ønsker at få e-mail fra hende, skal jeg blot trykke på „nei takk. Jeg ringede til Elin og forklarede hende, at det ville få uoverskuelige konsekvenser, hvis der nu skulle til at føres valgkamp på vores private e-mail adresser. Til dette svarede hun, at jeg blot kunne trykke på nei takk og at hun i øvrigt ville slette mig af sin liste.

Men det er ikke nok, idet hvis det bliver almindeligt, at gud og hver mand sender e-mail, fordi de mener de har et budskab eller for den sag skyld vil sælge en mobiltelefon, så ender det med at man skal bruge en søgemaskine for at finde moster Annas julehilsen. Derfor: Lad os blive enige om, at e-mail adresserne er private og annoncører af politiske holdninger eller andre produkter må holde sig til egne hjemmesider, og hvis man dér, selv beder om oplysninger, så værsgo.

**Leif Jacobsen, Eiði**


## HYGG HER

Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

### Brúktir bilar til sølu

| Verksmiðjumerki | km. | mán. | árg. | søluprísur |
|---|---|---|---|---|
| Daihatsu Charade 1.3 5H | 170.000 | Des. | 1991 | 19.000,- |
| Nissan Sunny 1.6 4H | 125.000 | Apr. | 1989 | 31.000,- |
| Suzuki Baleno Van vørub. | 45.000 | Aug. | 1997 | 75.000,- |
| Opel Astra 1.6GLS 4H (Sýnaður 03/00) | 66.000 | Sep. | 1995 | 92.500,- |
| Opel Astra 1.6 Sport 4H | 60.000 | Mar. | 1996 | 95.000,- |
| Rover 200 1.4i 4H | 42.900 | Jan. | 1997 | 105.000,- |
| Fiat Scudo 1.9TD vørub. | 130.000 | Mar. | 1997 | 105.000,- |
| Mitsubishi L300 4x4 vørub. | 90.500 | Aug. | 1996 | 119.000,- |
| Nissan primera 2.0SLX 4H | 25.000 | Aug. | 1997 | 139.000,- |
| Citroën Xantia 1.9TD St. | 44.500 | Apr. | 1998 | 154.000,- |
| BMW 318TDS 4H | 83.000 | Apr. | 1998 | 180.000,- |
| Galloper 2.5 TDi - 7 pers. (3ára garanti frá 1. innreg.) | 37.400 | Apr. | 1999 | 215.000,- |
| Mitsubishi Pajero 2.8GLS 7 pers. 5 H (3ára garanti frá 1. innreg.) | 33.000 | Mai | 1999 | 310.000,- |

OG FLEIRI AÐRAR BRÚKTAR BILAR SO HYGG INN Á GÓLVIÐ OG FÁ EITT GOTT TILBOÐ!

Ford Fiesta 1.3i 3 H • Árg. okt. 1991 koyrt 61.500 km. • Einans kr. 29.000,-
Sýnaður 10/00

Vælkomin til

Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Hoyvíksvegur 63 - FO-100 Tórshavn - Tel. 313666 - Fax 310866